# Flyta amboð á Fútaklett

*Byggifelagið J&K Petersen er nú av álvara farið at rigga til at gera vegin í samband við undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund*

EDVARD JOENSEN

**Á Fútakletti:** Gongd er nú av álvara komin á fyrireikingarnar til vegagerðina í samband við fasta sambandið undir Vestmannasund. Gravimaskinur og onnur amboð skuldu flytast á Fútaklett seinnapartin týsdagin.

Eyðfinn Lenvig, byggifrøðingur hjá byggifelagnum J&K Petersen, sigur, at fyrireikingarnar ganga eftir ætlan. Boriflakin við amboðunum, sum brúkast skulu í samband við vegagerðina á Vágalandinum, skuldi beint eftir middag týsdagin fara av Gomlurætt.

Gravimaskina og annað, sum brúkast skal, verður sett á land har, vegurin frá sjálvum tunnlinum skal byrja. Onkur skúrur er fluttur vestur og stendur nú við landsvegin millum Oyrargjógv og Sandavág, haðani arbeitt eisini fer at verða oman móti tunnilsmunnanum.

Tað er soleiðis, at teir ætla at arbeiða frá báðum endum og so brúka tilfarið, sum sprongt verður, til ífyllu undir vegnum.

Sett verður á at grava oman av, beinanveg komið er vestur við gravimaskinuni. Kannað verður eftir, hvussu djúpt, er og annað slíkt fyrireikingararbeiði verður so gjørt hesa vikuna, sigur Eyðfinn Lenvig.

Síðan verður borivognurin settur upp, og væntandi verður klárt at fara undir boring og spreinging fyrst í næstu viku.

Byggifelagið J&K Petersen hevur sjálvt maskinur og fólk at passa maskinurnar. Men vanligt er, sigur Eyðfinn Lenvig, at tey royna at brúka so nógva lokala arbeiðsmegi sum gjørligt, har tey arbeiða.

Hvussu verður við til dømis lastbilum í Vágum, dugir hann ikki at siga enn, tí tað verður ikki so aktuelt beinanveg. Sjálvt vegarbeiðið verður ikki meira umfatandi enn so, at teir bilar og gravimaskinur, felagið sjálvt hevur, helst fara at klára tann allarfyrsta tørvin. Men tá sprongt verður og tilfarið skal koyrast burtur, verður kanska ein onnur støða, sigur Eyðfinn Lenvig.

# Nýggj útstykking í Bø

*Bíggjar Kommuna fer undir útstykking til eini fimm-seks nýggj sethús í bygdini. Esini verður nýggj kloakkskipan løgd um alla bygdina*



*Í Bø verða vegirnir grivnir upp fyri nýggjari kloakkskipan*

*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Bøur:** Bíggjarfólk verða fleiri í tali um stutta tíð. Kommunan fer undir nýggja útstykking oman fyri gomlu bygdina í Bø, og har sleppa eina fimm-seks nýggjar familjur at búgva. Tað standa í løtuni tvey hús á økinum, har nýggja útstykkingum verður. Hon verður so í framhaldi av teimum verandi húsunum.

Trý av stykkjunum er longu umbiðin. Av teimum er ein umsókn, sum hevur bíðað eina tíð, sigur Jógvan Heinesen, bygdarráðslimur í Bø.

Hann sigur, at ætlandi fer vegagerðin til útstykkingina í gongd í september mánað. Tað búgva í dag knappliga 50 fólk í Bø, so nýggja útstykkingin fer at merkjast.

Bíggjar Kommuna er annars hampiliga væl fyri fíggjarliga, sigur Jógvan Heinesen, bygdarráðslimur í Bø. Men nú fara tey at brúka burtur av har úti, sigur hann. Bíggjar Kommuna er í løtuni í ferð við at leggja nýggja kloakkskipan um alla bygdina. Gamla kloakkskipanin var vorðin heldur vánalig, og valt varð tí at gera alt av nýggjum. Talan er um eitt arbeiði, sum fer at kosta út móti milliónini, sigur Jógvan Heinesen, sum hevur eftirlit við arbeiðinum fyri Bíggjar Kommunu. Hann sigur, at í hesari milliónini, er útstykkingin ikki íroknað. Hvat hon fer at kosta, er ikki neyvt uppgjørt enn. Tað verður á komandi fíggjarætlan, sigur hann.

Umframt trý fjós, eru eingi arbeiðspláss í Bø. Tó er einki arbeiðsloysi millum bíggjarfólk. Jógvan Heinesen sigur, at bíggjarfólk arbeiða aðrastaðni í oynni. Onkur er til skips. Fleiri yvirmenn. Annars eru tað fólk við fastari inntøku.

Framtíð tykist vera í Bø, tí fólkið er ungt. Bøur hevur lægsta meðalaldur í Vágum, sigur Jógvan Heinesen. Hann liggur á 36,1 ári, sigur hann.

Skúli er tó eingin í Bø. Bíggjar Kommuna arbeiðir saman við Sørvágs Kommunu um í fleiri málum, millum øðrum skúlamálum. So skúlabørnini í Bø verða koyrd til Sørvágs í skúla.

# Umvæla Bíggjar Kirkju



*Klædningurin á endavegginum í Bíggjar Kirkju var so vánaligur, at hann varð tikin uttan av og verður partvíst skiftur út*

*Klædningurin verður skiftur á galvinum á Bíggjar Kirkju*
*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Bøur:** Bíggjar Kirkja verður umvæld. Klædningurin á endavegginum er tikin av og verður partvís skiftur út. Hóast kirkjan stendur, um tornini falla, kemur tó fyri, at veggurin verður so vánaligur, at hann má umvælast.

Á Bíggjar Kirkju er endaveggurin tikin niður, tí tíðarinnar tonn er farin at gera um seg á kirkjuni, sum er frá 1865.

Partur av klædninginum er so illa farin, at hann verður skiftur. Okkurt er tó, sum kann brúkast aftur, og tað skal tað so sambært forskriftum frá friðingarmyndugleikunum.

Tað er soleiðis, sigur Bjarni Bæk, dómpróstur, sum umsitir kirkjubygningarnar, at er ein fjøl, sum partvís kann brúkast aftur, verður tann oyðilagdi parturin tikin av og skoytt verður so upp í aftur.

Fornminnissavnið hevur góðkent arbeiðið, sum nú verður gjørt í Bø, sigur Bjarni Bæk.

Tá gamalt verður tikið niður, verður ofta komið fram á eitthvørt, sum ikki sást. Soleiðis er eisini í Bíggjar Kirkju. Gamli seymurin er illa farin nógvastaðni, og festi er einki. Tí verður neglt av nýggjum. Onkur planki verður skiftur millum skins og holds, og bjálvað verður við glasull.

Útveggurin er meira »umstendiligur« at fáast við. Har skal tað, sum brúkast kann aftur, setast aftur í sama stað, har tað var, áðrenn tikið varð niður.

Nýggja tilfarið, brúkt verður, er heldur ikki hvat sum helst. Talan er um serligt innflutt timbur úr Noreg, har seintvaksandi trø eru brúkt. Hesi trøini eru helst eini 300 ára gomul.

Í fjør varð tornið í Bíggjar Kirkju umvælt eftir somu fyriskriftum, sum klædningurin nú verður.

Bjarni Bæk, dómpróstur, sigur, at tað er sera ringt at meta um kostnaðin av slíkum arbeiði, tí tað kemur alla tíðina okkurt aftrat, so hvørt, sum tikið verður uttanav. Tí er hildið best, at arbeiðið verður gjørt fyri rokning. Eisini tí, at tað er at kalla ógjørligt hjá handverkarunum at geva eitt tilboð. Teir vita jú ongantíð, hvat kann koma undan.

Tað er Heri Jensen, timburmaður í Sørvági, sum stendur fyri umvælingini á Bíggjar Kirkju.



*Føroysk luttøka á ONS 2000 í Stavanger:*

# Útlendsk oljufeløg eiga at brúka føroyskan ídnað

*Fleiri av oljufeløgunum, sum hava søkt um lisens við Føroyar, hava kunnleika um føroyskar fyritøkur í oljuhøpi, og summi hava longu havt samband við fyritøkurnar. Men við givnu loyvunum verður tað knappliga álvara, bæði hjá oljufeløgunum og hjá føroysku fyritøkunum, og tí heldur Menningarstovan, sum skipar fyri føroysku luttøkuni á ONS, at tað ræður um at vera sjónligur og smidligur. Hann heldur eisini, at oljufeløgini, sum fáa loyvi, eiga at brúka høvið á ONS at koma í samband við føroyskt vinnulív*

JAN MÜLLER

Í døgunum 22. til 25. august 2000 verður stóra frálandavinnuframsýningin ONS 2000 hildin í Stavanger. Tær báðar frálandavinnuframsýningarnar, ið serliga venda sær til oljuvinnuna Ì Norðsjónum, Offshore Europe og ONS (Offshore Northern Seas) verða hildnar annaðhvørt ár í Aberdeen og annaðhvørt ár í Stavanger.

Í ár fara 24 føroyskar fyritøkur og fyritøkusamstørv at bjóða seg fram á ONS 2000, nevniliga:

Atlantic Airways í Vágum
Atlantic Supply Base í Runavík
Atlanticon í Tórshavn
Eimskip í Føroyum í Tórshavn
El-Service á Skála
Faroe Base Support Services í Tórshavn
Faroe Ship í Tórshavn
Farpack í Tórshavn
Føroya Oljurágeving í Fuglafirði
Føroya Tele í Tórshavn
Injector International í Vági
KJ-Hydraulik í Fuglafirði
Leif Mohr í Tórshavn
Norserv Drelnes á Tvøroyri
Poul Hansen í Tórshavn
Poul Michelsen í Tórshavn
Smyril Line í Tórshavn
Thor í Hósvík
Tor Shipping í Tórshavn
Tórshavnar Skipasmiðja í Tórshavn
Tryggingarfelagið Føroyar í Tórshavn
Vagar Airport í Vágum
Viking Shipping í Sandavági
Vónin í Fuglafirði

Av hesum fara Atlantic Supply Base, Norserv Drelnes og Tórshavnar Skipasmiðja at hava egnan serbás á føroyska felagsbásinum.

Herumframt fara fleiri smærri fyritøkur, sum eru tiknar upp í upplýsingartilfarinum Faroe Islands Business Environment, at taka lut í framsýningini á føroyska felagsbásinum. Og sjálvsagt verður Oljumálastýrið og Vinnuhúsið við á føroyska felagsbásinum stendur í tíðindaskrivi frá Menningarstovuni.

Føroyska luttøkan á ONS 2000 er náttúrliga merkt av vinnuligu áhugamálunum og



*Føroyingar hava verið við til fleiri oljumessur í útlandinum*

staðiligu royndunum hjá føroyskum fyritøkum at koma vinnuliga upp í oljuvinnu sum heild og serliga í føroyska økinum. Luttøkan á ONS 2000 kann fáa serligan týdning, stendur í skrivi frá Menningarstovuni, tí beint upp undir framsýningina verða loyvini frá fyrsta leitingar- og útvinningarumfari givin.

Tey oljufeløg, sum ikki fáa loyvi, fara helst at taka seg úr Føroyum, metir Menningarstovan, ið hvussu so er fyri fyrst, meðan tey oljufeløg, sum fáa loyvi, fara beinanvegin undir stak umfatandi og nágreiniligu fyrireikingarnar at byrja kostnaðarmiklar leitingar og møguligar boringar longu á sumri 2001. Partur av fyrireikingunum verður at leggja leitingar- og útvinningarvirksemið soleiðis til rættis, at føroyskt vinnulív gerst partur av hesum virksemi. Hetta er eisini sett sum treyt í útbjóðingini og í loyvunum, sum verða givin.

Fleiri av oljufeløgunum hava kunnleika um føroyskar fyritøkur í oljuhøpi, og summi hava longu havt samband við fyritøkurnar. Men við givnu loyvunum verður tað knappliga álvara, bæði hjá oljufeløgunum og hjá føroysku fyritøkunum. Tí heldur Menningarstovan, sum skipar fyri føroysku luttøkuni á ONS, at tað ræður um at vera sjónligur og smidligur. At vera sjónligur tryggjar ikki einsamalt vinnuligan part í komandi frálandavinnuni: fyritøkurnar eru tí eisini fúsar at taka nýggjar, óvanligar uppgávur upp á seg og laga seg eftir nýggjum virkistreytum.

Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni hevur stórar vónir til føroysku luttøkuna í ár, nettupp tí, at Oljumálastýrið og oljumálaráðharrin hava gjørt eitt so stórt arbeiði fyri at fáa lisensirnar býttar út undan framsýningini. Hann vónar eisini, at tey feløg, sum fáa loyvi fara at brúka føroysku luttøkuna á ONS sum eitt høvi til at koma í samband við føroyskan ídnað og at tryggja, at hann verður tikin við í komandi útviklingin. -Eg haldi tað er umráðandi fyri framhaldandi succes í Føroyum, at tað føroyska vinnulívið ikki kennir seg vónsvikið av oljufeløgunum, sum nú fáa loyvi. Tí vænta vit, sum fara á ONS okkum nógv burtur úr leggur Menningarstjórin aftrat.

Føroysku fyritøkurnar hava annars sett sær fyri at vera væl fyrireikaðar á ONS 2000. Sjálvar vera tær á føroyska básinum, har tær hava tilfar liggjandi frammi, sum lýsir fyritøkuna og hvat hon hevur og ætlar sær at megna. Tær hava sent kendum og møguligum samstarvsfyritøkum og oljufeløgum skriv og boðað frá, at tær vera at hitta á ONS 2000. Felagsfaldari, sum lýsir luttakandi fyritøkurnar, liggur eisini frammi saman við fyrrnevnda almenna upplýsingartilfari, Faroe Islands Business Environment, sum eisini sæst á alnótini, á HYPERLINK http://ms.olivant.fo. Nærri upplýsingar um ONS 2000 fáast annars á HYPERLINK http://www.ons.no

*Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum:*

# Bert pláss fyri fýra loyvum í »Gullhorninum«

*Herálvur Joensen váttar , at tað verða feløg ella samtøk, sum verða vónsvikin av 1. útbjóðing og sum vandi kann vera fyri vilja taka seg heilt úr føroyaøkinum. Blaðið skilur, at talan er kanska um eini fýra feløg, sum einki loyvi fáa.*



JAN MÜLLER

Nú fyrstu loyvini at bora eftir olju og gassi við Føroyar verða latin oljufeløgunum hósdagin verður sjálvandi gitt, hvørji øki tey ymsu oljufeløgini fáa og hvat tey hava bundið seg til at gera afturfyri. Ikki minst útlendsk oljubløð bera leysatíðindi, sum ikki fella í so góða jørð í Oljumálastýrinum. Oljutíðarritið „Energy Today" skrivar nú um dagarnar, at føroysku oljumyndugleikar hava roynt at fáa oljufeløgini at yvirbjóða hvørt annað fyri harvið at fáa eina so munagóða leiting sum tilber.

Blaðið skrivar m.a., at „The government is playing an interesting gave. It is trying to maximise the work programmes. Because companies were able to bid for part block, some applications overlap and the government is playing the bidders off against one another to get the most wells drilled. It is a matter of competitions and negatiations, so companies can overbid" siga keldur við blaðið.

Amy McLellan, sum skrivar greinina, vísir í hesum viðfangi á, at føroyingar hava megnað at fáa oljufeløgini til at átaka sær at bora ikki færri enn 20 brunnar í hesum fyrstu runduni. Sammett við Falklandsoyggjarnar er hetta sera nógv, tí har bundu feløgini seg bert til at bora seks brunnar.

Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum er ikki so fegin um greinina, sum hann sigur byggir á gitingar. -Greinin tekur als ikki hædd fyri, hvussu lítið tað økið feløgini vilja bora á føroyska landgrunninum er. Tí verða tað fleiri boringar, sum útiloka hvørja aðra, og tað merkir, at samlaða talið á boringum í fyrstu rundu verður væl lægri enn tær 15-20, sum blaðið sipar til. Av tí av flestu feløgini vilja bora í sama øki og at øll feløgini ikki kunnu fáa tað, so verða tað ikki so nógvir brunnar boraðir.

Sosialurin skilur, at tað verða undir 10 brunnar boraðir í hesi fyrstu útbjóðingini, og tað heldur Herálvur Joensen eisini vera gott.

Hann vil einki upplýsa, hvør fær lisensir, men Sosialurin skilur, at talað á loyvum verður millum 5 og 10. Eitt loyvi er givið inni á sjálvum basaltinum, har tað eru tvey feløg, sum hava søkt um tað sama og sum tí eru sligin saman. Hetta er sambart reglunum fyri 9 ára loyvi, at feløg í fyrstu syftu vilja gera seismiskar kanningar og ikki bora. Eftir trimum árum skulu feløgini so gera av, um tey vilja fara undir boring á hesum øki út sum eitt seksára loyvi ella tey vilja lata økið aftur.

Herálvur Joensen vil siga so mikið, at allar borgingarnar liggja niðri í landssynningshorninum í lutvíst fáum teigum. Oljufyrisitingin hevur roynt at fáa eina so góða leiting sum tilber men hevur sjálvandi eisini roynt at gingið umsøkjarunum á møti so langt tað hevur verið mett rætt og gjørligt. Tað skilst, at fýra oljusamtøk fáa loyvi í tí sokallaða „Gullhorninum". Við øðrum orðum verða tað tvey samtøk, sum møguliga einki loyvi fáa í heila tikið.

### Skeivir upplýsingar

Hvat viðvíkur gitingunum sum teimum í Energy Day so er Herálvur Joensen sera vónsvikin av, at slíkar meldingar koma út, tí tær eru beinleiðis skeivar. -At vit hava spælt oljufeløgini út móti hvørjum øðrum fyri at fáa tey at bjóða yvir, er beinleiðis skeivt. Tað hava vit nettupp umgingið, tí vit vildu ikki hava talið av boringum í hvørjum einstøkum øki at vera størri enn tað, sum jarðfrøðin í økinum rættvísger. Vit hava sagt, at vit vildu ikki hava boringar, sum feløg bara hava kastað inn til okkara fyri at fáa eitt øki, fyri síðani at koma aftur til okkara at samráða seg burtur úr teimum. Vit vildu hava tað talið av boringum, sum jarðfrøðin kravdi fyri at man kann siga, at man hevur kannað tilfeingispotentialið í økinum.

Herálvur sigur annars, at endamálið við at hava eina kapping um økini, er sjálvandi tann, at hon skal virka til okkara fyrimun. -Vit vilja sjálvandi hava mesta talið av boringum á tí lítla økinum, sum feløgini eru sinnað at bora í. Men fer kanska at síggja best aftur út frá tí máta, sum vit hava skorið loyvisøkini til uppá. Roynt hevur verið at skera økini soleiðis, at vit fáa tað maksimala talið av boringum. Men vit hava annars hildið feløgunum aftur til ikki at fara inn og bara bjóða boringar omaná fyri at standa seg betur í kappingini.

### Onkur verður vónsvikin

Herálvur Joensen váttar annars, at tað verða feløg ella samtøk, sum verða vónsvikin og sum vandi kann vera fyri vilja taka seg úr føroyaøkinum. Blaðið skilur, at talan er kanska um eini fýra feløg, sum einki loyvi fáa.

-Vit hava tó tikið hædd fyri at fáa flestu av umsøkjarunum loyvi. Vit kundu endað við, at uppaftur fleiri feløg vóru vónsvikin. Men okkara trupulleiki hevur verið, at økið, sum øll vilja hava, er so lítið og vit hava mett, at tað sunnasta hornið av landgrunninum, har boringar skulu gerast, kann ikki bera meira enn fýra loyvi. Aftrat hesum koma so nøkur loyvi aðrastaðni.

Uppá fyrispurning um feløg, sum einki loyvi fáa nú, hava møguleika at „hekta" seg uppá loyvini hjá øðrum sigur Herálvur Joensen, at tað vil so verða viðgjørt uppá ein vanliga máta. Er okkurt felag, sum hevur fingið loyvi og er áhugað at minka um sín part og selja út til onkran annan, so er tað eisini ein møguleiki, men sum tó skal góðkennast av Oljumálastýrinum.